

# Samkomublaðið fyri jan./febr. 2018

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Jesu blóð - tann reyði tráðurin í Guds frelsuætlan

Pauli Høj

Tá vit tosa um Guds frelsuætlan og skulu finna tann reyða tráðin í hesi hending, síggja vit fleiri ting, sum ganga aftur. Jesu blóð er sera týðandi, tað peikar eisini á líðingarfrásøgnina og krossin.
Seinastu tíðina eri eg sterkt mintur á blóðið, sum Bíblian talar um bæði í G.T. og N.T. Eg haldi, at tað er uppá sítt pláss at seta sjónareykuna á júst hetta evnið, nú vit ganga inní ár 2018.

Um vit hava eina stóra skuld, so er einki betur, enn at hava dekning fyri hesa skuld, ella um tað er okkurt, vit muga keypa, at vit hava pengarnar.

Op. 5:9 tosar um, at vit eru keypt við Jesu blóði.
Op.1:5 – *Honum sum elskar okkum og hevur loyst okkum frá syndum okkara við blóði Sínum*

1. Pæt. 1:18-19 *Tit vita jú, at tað var ikki við tí, sum forgeingiligt er - silvuri ella gulli - tit vórðu leyskeypt frá dáraatburði tykkara, sum arvaður var frá fedrunum. Nei, tað var við dýra blóði Kristusar - sum av lýtaleysum og ódálkaðum lambi*
Áp. 20:28 Tosar um tey, sum Hann vann Sær (goldið) við Sínum egna blóði.

Irene Park bleiv ein yvirgivin kristin. Men áðrenn tað var hon ein høgt vird heks í Florida, sum førførdi gentur og dreingir inn í okkultar aktivetir. Hon segði, at tey børn, hon ongantíð kundi náa, vóru tey, har foreldur vardu tey, við at biðja yvir teimum í Jesu navni, ímeðan tey høvdu álit á Jesu blóð og ta ávirkan, tað hevði.

Í dag kemur nógv okkult sníkjandi inn í skúlar undir dulnavninum “inklusión,” skrivi- og talufrælsi. Tað er orsøk at hava ein ótta fyri hesi gongd, og tí er gott at hava foreldur og lærarar, sum biðja og ákalla Jesu blóð yvir børnini.
Í dag kunnu vit fylgja við okkara børnum við fartelefonum, men største verjan, vit kunna geva teimum, er at ákalla Jesu blóð, tí Satan bleiv sigraður á krossinum ígjøgnum blóðið, og er hetta eisini okkara sigur sum trúgva. (Kelda: Et ord til dagen).

Op. 12:11 *Teir hava sigrað hann (djevulin) við blóði lambsins og við orði vitnisburðar síns;*
v.7-9 tosar um ein bardaga í himli, har djevulin bleiv sigraður.
Her verða vit mint á vitnisburðin og orðið, sum vit kunna boða. Eisini biðja út í trúgv, tí tað er kraft í Jesu blóði, sum gevur sigur á myrkursins valdi.

Tú veitst ikki, hvussu dýrabar heilsa er, fyrr enn tú ert sjúkur. Tá tú ert svangur ella hungrar, gerst maturin dýrabarur. Tostin ger vatnið virðismikið, og fátakæradømið ger ríkidømi dýrabart. Synd ger Jesus blóð dýrabart og virðismikið, tí uttan Jesu blóð er eingin reinsan frá synd.

1. Jóh 1:7 Men liva vit í ljósinum - eins og Hann er í ljósinum - so hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesusar, Sonar Hansara, reinsar okkum frá allari synd.

# Skrá fyri jan./febr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 15. jan. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 16. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 19.00: | Junior |
| Leygardagur | 20. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við Búgva Olsen |
| Sunnudagur | 21. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti. Ymiskar tænastur luttaka |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 22. jan. | kl. 19.00: | Felags bønarmøti, fríkirkjunetverkið |
| Týsdagur | 23. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 25. jan. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| | | kl. 20.00: | Kvøld fyri hjún |
| Leygardagur | 27. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við Honnu Poulsen |
| Sunnudagur | 28. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen<br>Breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 29. jan. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 30. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 3. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við ymiskari luttøku |
| Sunnudagur | 4. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. febr. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 8. febr. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 10. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við Rúna Rasmussen |
| Sunnudagur | 11. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. febr. | kl. 19.00: | Reach Out á Hellunum |
| Týsdagur | 13. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 19.00: | Junior |
| Leygardagur | 17. febr. | kl. 20.00: | Einki AWAKE (vegna mini Teenstreet í Bylgjuni) |
| Sunnudagur | 18. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Teenstreet,Josh og Debs Walker (USA) |

# Lýsingar

**Kvøld fyri hjún**
Kundi tú hugsað tær at sloppið út eitt kvøld saman við tínum hjúnafelaga? So er at seta kross í kalendaran. Hóskvøldið 25. januar kl.20 verður eitt kvøld fyri hjún í Kelduni. Bjarta Petersen kemur at tosa og Miriam Høj syngur. Kaffi verður aftaná.

**Kvinnulega**
Kvinnulega við Anne Hove Sunnarvik 23.-25. februar. Tekning á tlf. 217825 Rannvá Royðutoft ella Eydnu V. Jacobsen 287013.

**Vitjan frá Teenstreet**
Mini Teenstreet 2018 Ì samband við hetta stóra tiltakið í høllini í Runavík, koma hjúni Josh og Debs Walker (USA) at tala hendan sunnumorgun 18 februar kl. 11.00  í Kelduni.

**Hillsong London í Kelduni**
Konsert við Hillsong London verður í Kelduni fríggjakvøldið 9. Mars kl. 20.00.
Kostnaðurin er 169 kr. í forsølu og verður at fáa á netinum og í Kelduni.
Meira kunning kemur seinni.




Keldan

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið
Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584